# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17. januar 2025 |
| Mál nr.: | 25/00041 |
| Málsviðgjørt: | SPE, NB, EC, MJ, BAB |
| Ummælistíð: | 17-01-25 til 07-02-25 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**Talgildu Føroyar 2.0**
(Heildarætlan fyri 2025 til 2027)

**§ 1.** Landsstýrisfólkinum verður heimilað at halda útreiðslur at fremja verkætlanina Talgildu Føroyar 2.0.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi verða 66 mió. kr.
*Stk. 3.* Útreiðslurnar hjá landsstýrismanninum kunnu í mesta lagi verða 45 mió. kr.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkinum verður heimilað at gera avtalur við privatar og almennar fyritøkur, grunnar og kommunur at fíggja verkætlanina.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2028.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at talgilding framhaldandi skal vera drívmegi til vøkstur, framtíðartryggjaða vælferð og effektivisering av almenna geiranum. Verklagslógin er grundað á heildarætlanina *Talgilding av samfelagnum heldur fram*, árini 2025 - 2027, sum er hjáløgd sum fylgiskjal 1, og er framhald av ætlanini fyri 2016 - 2020 og ta menning, ið hevur verið síðan. Harumframt eru niðurstøðurnar hjá KST arbeiðsbólkinum í Vakstrarforum brúktar til at seta hesa heildarætlan saman.

Føroyar hava ment seg nógv, síðan sjøtul varð settur á fyrstu heildarætlanina fyri talgilding av samfelagnum í 2015. Vit hava í dag eitt fyrstafloks undirstøðukervi, sum er grundarlagið undir talgilding av tænastum frá almennum eins væl og privatum tænastuveitarum. Vit eru eitt talgilt framkomið land, har borgarar kunnu samskifta trygt og lætt talgilt.

Felags loysnir sum Samleikin og Vangin, eru vorðin fólkaogn og eru við til at lætta um gerandisdagin hjá føroyingum.

Gott 46.000 fólk hava fingið sær ***Samleikan*** og harvið atgongd til tað vaksandi talið av tænastum, bæði almennum og privatum, ið brúka Samleikan til eyðmerking og undirskrift. Bankar, tryggingarfeløg o.o. hava tikið Samleikan í brúk, tí tað gevur eitt trygt og brúkaravinarligt grundarlag fyri talgildum samskifti.

***Vangin*** veksur alsamt. Kommunur og almennir stovnar bjóða føroyingum eina felags inngongd til at avgreiða síni persónligu viðurskifti, har dátutrygd, atkoma og brúkaravinsemi eru í hásæti. Móttøkan er góð, og tænastuveitarar boða frá, at ferðslan bara veksur.

***Heldin*** er snúningsdepilin í allari almennari talgilding og grundarlagið undir tryggum flutningi av dátum úr og millum almennar skráir. Heldin er í dag skipað í rundskrivi, og í sambandi við nýggju nettrygdarlógina, sum er ávegis, verður Heldin ein enn meiri týðandi partur í at skipa nettrygdina í samfelagnum.

***Grundardáturnar***: *Fólkayvirlit*, *tinglýsing*, *matrikul* og *kortdátur* eru vorðnar lættari atkomuligar og ókeypis at brúka.

***Virkið***, sum er seinasti táttur í fyrstu heildarætlanini frá 2015 at seta í verk, er ávegis og verður eitt stórt frambrot fyri føroyskt vinnulív og almennu umsitingina.

***Skjáttan,*** sum ikki upprunaliga var partur av heildarætlanini, gevur í dag borgarum ein lættari gerandisdag, tá ið talan er um at prógva sín samleika t.d. í ferðsluni og aðrastaðni, har tørvur er at prógva aldur o.a.

Hesi átøk gera tað lætt og skjótt hjá borgarum, vinnu og myndugleikum at samskifta á ein tryggan, einfaldan og nútímans hátt. Mannagongdir eru lættari og effektivari, og meira orka er til aðrar uppgávur. Við hesum eru lunnar lagdir undir framtíðar menning og vøkstur.

Hetta hevur latið seg gjørt við politiskum vilja og framsøkni. Eitt nú við breiða samstarvinum millum land, kommunur og vinnu. Harumframt hava borgarar og starvsfólk í stóran mun verið búgvin og til reiðar til stóru broytingarnar, sum talgildingin hevur við sær. Næsta stigið á talgildu leiðini, er at fáa enn størri gagnnýtslu og fulla nyttu av undirstøðukervinum.

Føroyar standa fyri stórum haldførisavbjóðingum. Hesar krevja, at vit hugsa øðrvísi og broyta, hvussu vit veita okkara vælferðartænastur. Við eini heildarætlan fyri alt samfelagið er eitt av málunum, at talgildingin verður eitt av amboðunum at loysa stóru avbjóðingarnar við haldførinum. Heildarætlanin leggur dent á, hvussu samfelagið kann brúka dátur og nýggja tøkni, sum vitlíki og tólmenni, til at skipa tilfeingið betur og gera arbeiðsgongdir einfaldari. Hetta hevur við sær, at starvsfólk, innan eitt nú eldra- og sjúkrarøkt, fáa meira tíð at veita hesar týdningarmiklu tænasturnar í samfelagnum.

Talgilding hevur stórar møguleikar við sær, men ger okkum samstundis meira viðbrekin, bæði sum einstaklingar og sum samfelag. Átøkini í heildarætlanini taka fyrilit fyri, at nettrygd verður høgt raðfest. Tað er av alstórum týdningi, at vit lúka krøv um trygd og hava neyðugu skipanirnar til at verja okkara dátur og undirstøðukervi. Fyri einstaklingin kann talgilding hava við sær, at hann ikki megnar at fylgja við í talgilda rákinum. Tað krevur, at vit veita stuðul til teirra, ið hava tørv á hjálp. Heildarætlanin tekur fyrilit fyri, at almennar tænastuveitingar framhaldandi verða skipaðar soleiðis, at øll fáa javnbjóðis atgongd til vælferðarsamfelagið.

Tað verður talgildað á fleiri mótum í samfelagnum. Umframt felags loysnirnar hjá Talgildu Føroyum, bæði tær sum eru mentar, og tær sum eru ávegis í hesari heildarætlan, eru stórar og samfelagstýðandi loysnir, á bæði undirvísingar-, heilsu-, skatta- og tinglýsingarøkinum, ávegis. Kervið+ hjá Undirvísingarstýrinum, Talgilda Heilsuskipanin hjá heilsuverkinum, Kjarnan hjá Taks, og talgilda tinglýsingin hjá Umhvørvisstovuni eru fýra av stóru og týðandi verkætlanunum, ið eru í gongd og stuðla undir talgildingini av samfelagnum. Tað er av stórum týdningi, at hesi stóru tøk innan talgilding eru samskipaðið og hava eina felags kós. Hesa uppgávu fær nýggi talgildingarmyndugleikin, sum er ein av stóru átøkunum í hesari heildarætlanini, til uppgávu at seta í verk, sí niðanfyri.

Heildarætlanin 2025 - 2027 er býtt í tríggjar serstakar visjónir, ið hvør sær hava átøk, sum skulu fremja ætlanina í verki.

**Visjón 1 - Ein myndugleiki fyri talgilding**

1. Átak: Myndugleiki fyri talgilding setast á stovn
2. Átak: Tættari samstarv við kommunur og vinnu

**Visjón 2 - Samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu**

3. Átak: Vangin 2.0 – nýhugsan og útbreiðsla
4. Átak: Savna heilsutænastur á Vanganum
5. Átak: Mínboks til vinnuna og nýggjar funkur
6. Átak: Skjáttan við fleiri kortum og møguleikum
7. Átak: Talgild val
8. Átak: Vinnutænastur á einum stað

**Visión 3: - Munadygg umsiting**

9. Átak: Størri gagnnýtsla av fólkayvirlitinum
10. Átak: Knýta persónsdátur í Norðurlondum saman
11. Átak: Ríkisstovnar nýta talgilda undirstøðukervið
12. Átak: Samleikin brúkast uttanlands
13. Átak: Talgild kirkjubók
14. Átak: Ein almenn bankakonta
15. Átak: Nýtsla av nýggjari tøkni

### 1.2. Galdandi lóggáva
Ongin galdandi lóg er frammanundan.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landstýriskvinnuni heimild at brúka 45 mió. kr. netto til framhaldandi talgilding av samfelagnum og at fáa enn størri gagnnýtslu og fáa fulla nyttu av talgilda undirstøðukervinum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Heildarætlanin, *Talgilding av samfelagnum heldur fram*, árini 2025 - 2027, sum umfatar 15 átøk, er býtt á hesar tríggjar visjónir:

*1) Ein felags myndugleiki við føstum íløgukarmi*
Í fyrstu heildarætlanini var eitt av aðalmálunum, at land, kommunur og vinna samstarvaðu um uppgávuna at talgilda samfelagið. Nú er málið at fara eitt stig longri og seta á stovn ein myndugleika, ið stendur fyri yvirskipaðu talgildingini.

Skulu vit framhaldandi menna okkara vælferðarsamfelag, er neyðugt, at land og kommunur áseta ein fastan íløgukarm til talgilding, sum tryggjar støðufesti og framhaldandi menning av vælferðarsamfelagnum. Myndugleikin samstarvar við vinnuna, so alt samfelagið fær ágóðan.

*2) Samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu*
Vangin veitir borgarum tænastur frá øllum geirum: Landi, kommunum og vinnu. Heildarætlanin leggur høvuðsdent á at fáa tænastur, sum ganga tvørturum geirar, at hanga betri saman. Serlig atlit verða tikin til at fáa heilsudátur og -tænastur atkomuligar talgilt. Vinnan skal hava góðar møguleikar at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna talgilt.
Við einum virkisvanga, fer tað at bera til hjá vinnuni at fáa líknandi tænastur, sum vit kenna á Vanganum.

*3) Munadyggur almennur geiri*
Fyrisitingarligar uppgávur og mannagongdir skulu framhaldandi effektiviserast.
Vit skulu eisini fyrireika okkum til eitt samfelag við vitlíki, tólmennum, talukennara og aðrari tøkni. Vit skulu tora at vera nýskapandi. Hetta krevur karmar, so vit framhaldandi hava tamarhald á tøknini. Neyðugt er at gera eina langtíðarætlan fyri, hvussu vit brúka hesa tøkni.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er gjørt í samstarvi við Føroya Gjaldstovu/Talgildu Føroyar. Hesi hava fingið uppskotið til ummælis, umframt at uppskotið hevur ligið frammi á almenna hoyringarportalinum frá 17. januar 2025 til 7. februar 2025:

Vinnuhúsið, Kommunufelagið, Felagið Peningastovnar, stjórnarráðini, Undirvísingarstýrið, Sjóvinnustýrið, Vinnustovnurin, Umhvørvisstovan, Ríkisumboðið, Føroya Politi, Føroya Rættur, Føroya Stiftisstjórn, Almannaverkið, Sjúkrahúsverk Føroya, TAKS, Apoteksverkið, Heilsutrygd, Fróðskaparsetur Føroya, Akstovan, Tjóðskjalasavnið, Dátueftirlitið, Hagstovan, Landsfelag Pensjónista, MEGD og Gigni.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Heildarætlanin verður mett at kosta í mesta lagi 66 mió. kr., íroknað prísvøkstur og váðaískoyti. Í fíggjarlógini verða játtaðar 45 mió. kr. netto til endamálið, meðan í mesta lagi 21 mió. kr. eru inntøkur/fremmand fígging.

Í samlaðu upphæddunum í lógartekstinum fyri inntøkur/fremmanda fígging er talgild kirkjubók mett til í mesta lagi 5 mió. kr. Talan er um eina leysliga og óvissa upphædd, sum ikki er tikin við í talvuni niðanfyri. Talvan vísir tí eina samlaða upphædd fyri verkætlanina á 61 mió. kr. og eina inntøku á 16 mió. kr.

Fíggjarkarmurin sær tí soleiðis út árini 2025 til 2027:

| Nr. | Átak | 2025 | 2026 | 2027 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Myndugleiki** | | | | |
| 1 | Skipan av landsmyndugleika [1] | - | 1,0 | 2,5 | 3,5 |
| 2 | Samskipan millum land, kommunur og vinnu [2] | - | - | - | - |
| | **Samanhangandi tænastur til borgarar og vinnu** | | | | |
| 3 | Vangin 2.0 – útbreiðsla og endurhugsan | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 12,0 |
| 4 | Savna heilsutænastur á Vanganum [3] | 0,5 | 0,5 | 2,0 | 3,0 |
| 5 | Mínboks 2.0 – vinna og endurhugsan | 2,0 | 1,5 | 3,0 | 6,5 |
| 6 | Skjáttan 2.0 – útbreiðsla og funkur | 1,5 | 2,0 | 3,0 | 6,5 |
| 7 | Talgilt val [4] | 1,0 | - | - | 1,0 |
| 8 | Vinnutænastur á einum stað | 3,0 | 5,5 | 9,0 | 17,5 |
| | **Munadygg umsiting** | | | | |
| 9 | Ábøtur á fólkayvirlitinum [5] | - | - | - | - |
| 10 | Flutningur av persónsdátum í Norðurlondum [6] | 2,0 | 2,0 | - | 4,0 |
| 11 | Ríkisstovnar knýta í Talgildu Føroyar [7] | 0,5 | 0,5 | 1,0 | 2,0 |
| 12 | Samleikin brúkast uttanlands | 1,0 | 2,0 | - | 3,0 |
| 13 | Talgild kirkjubók [8] | - | - | - | - |
| 14 | Ein almenn bankakonta | - | 1,0 | 0,5 | 1,5 |
| 15 | Nýtsla av nýggjari tøkni (vitlíki) [9] | 0,5 | - | - | 0,5 |
| | **Tilsamans** | **16,0** | **20,0** | **25,0** | **61,0** |
| | *Harav váðaískoyti á 20%, og* | *2,7* | *3,3* | *4,0* | *10,0* |
| | *Prísvøkstur á 3%* | | *0,6* | *0,7* | *1,3* |
| | **Fíggjarkarmur í alt** | **16,0** | **20,0** | **25,0** | **61,0** |
| | Játtan á fíggjarlóg | 10,0 | 15,0 | 20,0 | 45,0 |
| | Inntøkur/fremmand fígging [10] | 6,0 | 5,0 | 5,0 | 16,0 |

*1) Talan er um at stovnseta nýggjan myndugleika, herundir at seta 2-3 starvsfólk. Talan er um fasta setan, sum sostatt kemur at ávirka raksturin frameftir.*
*2) Útreiðslur ísv. samskipan verður roknað sum partur av dagliga rakstrinum og tí ikki nøkur serskilt útreiðsla.*
*3) í 2025 og 2026 er hetta vit meta, at stovnar so sum Heilsutrygd, Apoteksverkið og Gigni koma at brúka á Vanganum. Í 2027 er tað ætlanin, at vit seta hol á at fáa dátur og tænastur frá Sjúkrahúsverkinum á Vangan. Útreiðslurnar ísv. hetta arbeiði verða goldnar av stovnunum (Inntøkur/fremmand fígging).*
*4) Útreiðslur ísv. at talgilda valkortið verða goldnar av kommunum, fólkakirkjuni og løgmálaráðnum. (Inntøkur/fremmand fígging).*

*5) Ábøtur á fólkayvirlitið verða goldnar av Umhvørvisstovuni. Mett verður, at 1 mió. átti at verið sett av til hetta árliga. Av tí at tað ikki er greitt, um henda fígging er tøk, er einki sett av til hetta átak.*
*6) Henda verkætlan verður væntandi goldin av verkætlanini nýtt THS hjá Sjúkrahúsverkinum (Inntøkur/fremmand fígging).*
*7) Ríkisstovnar rinda sjálvir fyri útreiðslur ísv. at knýta í talgilda undirstøðukervið (Inntøkur/fremmand fígging).*
*8) Fólkakirkjan rindar sjálv fyri menning av talgildari kirkjubók. Henda verkætlan er ikki kostnaðarmett enn, men kann hon gerast sum ein tillaging av KT-skipanini hjá fólkayvirlitinum, sum er ætlanin hjá Fólkakirkjuni, kundi hetta, leysliga mett, verið gjørt fyri 2-5 mió. kr.*
*9) Settar eru 0,5 mió. kr. av til at gera forkanningar, heildarætlanir o.l. ísv. nýtslu av nýggjari tøkni. Um farið verður víðari eftir hesa forkanning, skal hetta gerast í serstakari játtan til vitlíki.*
*10) Talan er um allar inntøkur/fremmand fígging. Leggja vit 5 mió. kr., sum talgilda kirkjubókin í mesta lagi verður mett at kosta, afturat, verða samlaða útreiðslurnar fyri verklagslógina í mesta lagi 66 mió. kr. og inntøkurnar til verkætlanina 21 mió. kr.:*

| Nr. | Átak | 2025 | 2026 | 2027 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Vangin 2.0 – útbreiðsla og endurhugsan | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 6,0 |
| 4 | Savna heilsutænastur á Vanganum | 0,5 | 0,5 | 2,0 | 3,0 |
| 7 | Talgilt val | 1,0 | - | - | 1,0 |
| 10 | Flutningur av persónsdátum í Norðurlondum | 2,0 | 2,0 | - | 4,0 |
| 11 | Ríkisstovnar knýta í Talgildu Føroyar | 0,5 | 0,5 | 1,0 | 2,0 |
| | **Tilsamans** | **6,0** | **5,0** | **5,0** | **16,0** |
| 13 | Talgild kirkjubók (óviss leyslig meting) | - | - | - | 2,0-5,0 |
| | Tilsamans við talgildari kirkjubók | | | | **18,0 – 21,0** |

Av omanfyrinevndu átøkum eru tað nøkur, sum koma at hava við sær eftirfylgjandi rakstrarútreiðslur. Fyri Talgildu Føroyar kemur ‘Skipan av myndugleika’ (nr. 1) at hava við sær árligar útreiðslur á upp til 3,0 mió. kr., harav í mestan mun til starvsfólkaútreiðslur, meðan tey átøk sum eru knýtt at Vanganum og Skjáttuni (nr. 3, 4, 5, 6, 7 og 11) fara at hava við sær rakstrarútreiðslur á umleið 1 mió. kr. Samanlagt 4 mió. kr. fyri Talgildu Føroyar. Rakstrarútreiðslurnar sum íkoma í tíðarskeiðnum verklagslógin er galdandi, 2025-2027, eru íroknaði í verklagslógina og verða tí ikki tiknar við í talvuna niðanfyri:

| *2025 prísir* | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 |
|---|---|---|---|---|---|
| Myndugleiki | 0 | 0 | 0 | 3,0 | 3,0 |
| Vangin | 0 | 0 | 0 | 0,5 | 0,5 |
| Skjáttan | 0 | 0 | 0 | 0,5 | 0,5 |
| **Samanlagt** | **0** | **0** | **0** | **4,0** | **4,0** |

Haraftrat kunnu rakstrarútreiðslur standast av øðrum átøkum, sum aðrir stovnar, t.d. Umhvørvisstovuni mugu bera.

Flestu átøk snúgva seg um at útbyggja verandi loysnir, og verður tað tí fyrst og fremst ‘vinnutænastur á einum stað’ (nr. 8), ‘talgild kirkjubók’ (nr. 13) og ‘ein almen bankakonta’ (nr. 14), sum ætlanin er at bjóða út av nýggjum. Átøkini sum eru knýtt at Vanganum og Skjáttuni (nr. 3, 4, 5, 6 og 11) eru umfatað av verandi útboði, meðan tey átøk sum er knýtt at ‘Samleikanum’ (10 og 12), ‘talgilding av valkortunum’ (nr. 7) og ‘flutningur av persónsdátum í Norðanlondum’ (nr. 10) ikki kunnu bjóðast út, tí tey átøkini eru knýtt at verandi loysnum og veitarum.

Væntað verður, at átøkini í heildarætlanin geva stórt gagn fyri samfelagið sum heild. Gagnið fer síggjast aftur í betri góðsku av tænastum, tryggari tænastur, og spardari tíð hjá bæði borgarum, vinnu og almennari fyrisiting. Nevnast kann sum dømi, at kanningar vísa, at skipað og væleydnað nýtsla av vitlíki í almennu fyrisitingini, kann spara 20-30% í almennu útreiðslunum. Nýtsla av felagsloysnum, so sum Vanganum og Samleikanum spara eisini borgarum nógva tíð. Altjóða kanningar vísa, at virði av hesi spardu tíð kann svara til á leið 2% av BTÚ. Virkisskrá og talgildar tænastur til vinnuna leggur eisini lunnar undir stórt gagn fyri vinnuna. Kanningar og royndir uttanlands vísa, at sjálvgreiðslur og opnar dátur um vinnuna, eru lykilin til størri innovatión og kann stuðla undir íverksetan.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið og kommunur. Heildarætlanin heldur fram við at leggja dent á munadygga umsiting. Hetta sæst serliga í visjónunum um *Myndugleikan fyri talgilding* og *munadygga umsiting,* har endamálið er at seta á stovn ein felags myndugleika, ið stendur fyri yvirskipaðu talgildingini, og framhaldandi at seta í verk nýggja tøkni, sum kann verða við til at effektivisera umsitingaruppgávur hjá bæði landi, kommunum og vinnu.

Ein felags myndugleiki fyri landið skal standa fyri at samskipa og samstarva um talgilding og menna og reka felags talgilda undirstøðukervið. Tá ið myndugleikin er farin at virka fyri landið, skal samskifti takast upp við kommunurnar, um at gerast partur av myndugleikanum og partur av einum føstum íløgukarmi fyri talgilding. Hetta fer at geva umsitingini hjá almennum stovnum og kommunum meira orku til aðrar uppgávur, vegna standardiseringar og einfaldari og skjótari málsviðgerð til gagns fyri bæði almennar myndugleikar, kommunur og vinnu. Grundarlagið fyri einum slíkum myndugleika finst í stóran mun longu í dag við virkseminum á Gjaldstovuni: Talgildu Føroyar og KT Landsins. Her finnast bæði førleikar og royndir at standa fyri felags almennum uppgávum innan leiðslu, menning, rakstri av KT og talgilding. Talan er tí ikki, um at seta á stovn nýggjan stovn, men í staðin víðka um virksemið hjá Gjaldstovuni til eisini at umfata myndugleikan til talgilding. Væntandi verða sett eini 2-3 fólk næstu 3 árini at standa fyri uppgávunum hjá felags myndugleikanum. Fígging er í verkætlanini til hesi 2-3 fólkini.

Talgilding og nýggj tøkni sum heild, skulu setast í verk fyri at skapa ein betri og effektivari almennan geira. Tøknin er týðandi amboð fyri loysa vaksandi avbjóðingina við vantandi arbeiðsmegi á alsamt fleiri fakøkjum. Tøkni kann serliga lætta um, tá ið talan er um einsháttaðar og tungar arbeiðsuppgávur á fyrisitingarligum økjum og innan heilsu- og eldrarøkt. Neyðugt er við nýhugsan, hvussu vælferðartænastur skulu veitast í framtíðini. Tøkni sum vitlíki (*AI*), tólmenni (*Robotics*) og tólnet (*IoT*) eru lykilin til, at hetta kann eydnast. Byrja verður við at gera forkanning av hesum í 2025. Úrslitið av hesari forkanning verður ein nýggj heildarætlan fyri vitlíki. Avsett eru 0,5 mió. kr. til at fremja hesa forkanning og heildarætlan.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Heildarætlanin heldur fram við at leggja dent á at bøta um tænastur til vinnuna. Hetta sæst serliga í visjónini um *samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu,* har endamálini eru, at veitingar og samskifti til vinnuna skulu verða smidlig og trygg. Vinnuvangin og Virkið fer at lætta um umsitingina hjá vinnuni og bøta um samskiftið millum vinnuna og almennar stovnar.

Virkið verður hornasteinur í at menna ein virkisvanga, soleiðis sum borgarar kenna tað á Vanganum. Vinnan skal hava atgongd til dátur og sjálvgreiðslur frá almennum tænastuveitarum á einum og sama stað. Tað skal vera lætt fyri vinnuna at geva, broyta og strika atgongdir hjá starvsfólkum, bókhaldarum, sakførarum o.ø. til skipanina, so tey kunnu dagføra skráir og hava neyðug loyvi at arbeiða við. Við eini felags loysn til vinnuligar sjálvgreiðslur, verður tað lættari hjá feløgum at avgreiða síni viðurskifti við almennar stovnar á Virkinum. Hetta leysgevur orku í umsitingini. Vinnan fær sostatt bara einar dyr at venda sær til í talgilda samskiftinum við tað almenna. Hetta krevur eisini, at vinnan fær ein talgildan postkassa sum Mínboks, ið kann brúkast at samskifta við tað almenna, sínámillum og við borgarar.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Talgildu loysnirnar fara framhaldandi at geva fólki og vinnu í útjaðaranum og sjófólki á fjarleiðum, betri møguleikar at avgreiða síni viðurskifti.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Talgildingin hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í síni heild, og kann gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleikum, bera brek og teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands, at brúka talgildar tænastur. Við framhaldandi talgilding av samfelagnum, er tó vandi fyri útihýsing av summum borgarum, ið hava trupult við at klára seg talgilt.

Talgildu Føroyar royna í mestan mun at ganga hesum borgarum á møti, við at lúka krøvini í Web Content Accessibility Guidelines (WCAG), level AA, ið er standardur, ið skal tryggja brúkaravinsemi og atgongd fyri persónar við serligum avbjóðingum, t.d. blind, sjónveik, lesiveik og deyv. Harumframt arbeiðir Talgildu Føroyar við at tryggja, at tænasturnar ikki eru torgreiddari enn 9. floks støði.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er mett í mun til Mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek.

Neyðug fyrilit vera tikin í verkætlanini, so uppskotið verður í samsvari við Mannarættindasáttmálan. Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal verða forðaður í at fáa lut í Talgildu Føroyum. Talgildingin kann hinvegin gera tað lættari hjá teimum, ið bera brek, og teimum, ið hava skerdar førleikar at samskifta við tænastuveitarar, sí punkt 2.6.

Tøknin skal geva øllum atgongd til okkara talgilda samfelag. Talgildingin skal gera tað lættari hjá hesum at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

***1) Hoyvíkssáttmálin***
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

*2) Europeiski mannarættindasáttmálin, EMRS*
Uppskotið er mett í mun til Mannarættindasáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek. Neyðug fyrilit verða tikin í verkætlanini, so uppskotið verður í samsvari við Mannarættindasáttmálan.

*3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*
Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal verða forðaður í at fáa lut í Talgildu Føroyum. Talgildingin fer at gera tað lættari hjá teimum flestu, ið bera brek, og teimum, ið hava skerdar førleikar. Tøknin skal geva øllum atgongd til okkara talgilda samfelag. Talgildingin skal gera tað lættari hjá hesum at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum, sí annars punkt 2.6.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar. Tvørtur ímóti arbeiðir man fyri at bróta markaforðingar.

Eitt átak í heildarætlanini, er at knýta persónsdátur í norðurlondum saman. Einki knýti er millum føroyska fólkayvirlitið og serliga danska fólkayvirlitið, har nógvir føroyingar eru skrásettir. Hetta hevur við sær, at tá ið m.a. ein føroyingar skal til Danmarkar í sjúkraørindum, verður hann skrásettur við donskum p-tali (CPR-nr) og av tí at einki knýti er millum føroyska og danska p-talið, ber ikki til at knýta upplýsingarnar saman við føroyska sjúkrahúsverkið. Hetta kann hava týðandi neiligar avleiðingar fyri sjúklingin. Henda avbjóðingin ávirkar ikki einans sjúklingar, men sæst eisini aftur á øðrum økjum. Landsstýrið hevur sett sær fyri, at loysa hesa avbjóðing og fáa í lag samstarv ið norðurlendskar myndugleikar, um at knýta fólkayvirlitini saman.

Samleikin er mentur og rikin soleiðis, at hann lýkur ES lóggávuna fyri samleikar. Tað eru gjørdar royndir at fáa Samleikan góðkendan, í fyrstu atløgu í Danmark, men tað hevur víst seg, at uppgávan gjørdist ov stór og torgreidd. Við at knýta fólkayvirlit saman, hava vit betri fortreytir fyri, at fáa hetta framt. Tá norðurlendsku fólkayvirlitini eru knýtt saman, er málið, at fáa eina avtalu við danir um, at føroyingar kunnu rita inn við Samleikanum til útvaldar danskar talgildar tænastur, sum t.d. sundhed.dk, borger.dk og optagelse.dk.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið elvir ikki til revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýriskvinnuna, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýriskvinnuni, at halda útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar við 45 mió. kr.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Eftir uppskotinum verður heimilað landsstýrisfólkinum at gera neyðugar avtalur at talgilda samfelagið.

Hetta er ein materiel heimild og av tí, at heildarætlanin hevur við sær útreiðslur í trý fylgjandi fíggjarár, er neyðugt at útvega játtan fyri hvørt árið til útreiðslurnar í tí árinum. Lógaruppskotið hevur eisini til endamáls at upplýsa Løgtinginum um alla verkætlanina.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2028.

Fíggjarmálaráðið, 17. januar 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Heildarætlanin, talgilding av samfelagnum heldur fram, árini 2025 - 2027